FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 12. desember 2025
J. nr.: 25/32842

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-057/2025 frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um umval.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann ein einstakur atkvøðuseðil vera avgerandi fyri, at eitt løgtingsval verður ógildað, eins og hent er við kommunuvalinum í Runavíkar kommunu?

2. Hevði tað borið til í sambandi við eitt løgtingsval at havt umval á bara einum valstaði, hóast øll sum skuldu velja á tí valstaðnum kendu úrslitið av valinum í restini av landinum frammanundan?

Svar til spurning nr. 1 & 2:
Sambært § 44, stk. 1 í løgtingsvallógini skulu klagur um løgtingsval verða umsiting tingsins í hendi innan kl. 10:00 tíggjunda yrkadag eftir valdagin. Á fyrsta tingfundi, sambært § 9, stk. 1 í stýrisskipanarlógini, verða m.a. klagur um løgtingsvalið kannaðar, sambært § 3, stk. 2, nr. 2 í tingskipanini. Síðani atkvøður Løgtingið um góðkenning av valbrøvunum og valúrslitinum sambært § 7 í stýrisskipanarlógini, § 44, stk. 2 í løgtingsvallógini og § 4 í tingskipanini.

Vísandi til, at tað er Løgtingið sum viðgerð klagur í samband við løgtingsval, og sum góðkennir valbrøv og valúrslitið, meti eg ikki, at spurningurin um møgulig úrslit av einari klaguviðgerð um løgtingsval fellur innanfyri málsøkið hjá Fíggjarmálaráðnum.

Av tí, at eingin yvirskipaður myndugleiki er at viðgera klagur til løgtingsval, ber soleiðis heldur ikki til at samanbera millum kommunuval og løgtingsval hesum viðvíkjandi.

Tinganes, 12. desember 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum